# 10 og ikki 4 milliónir

**Hallið hjá Fiskasøluni er uppgjørt til 23,1 mió kr. Tá eru kostnaðir av umskipanini tiknir við. Sjálvur raksturin sýnir eitt úrslit, sum er seks milliónir verri enn tað, sum varð nevnt í heyst**

ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*

– Vit rokna við, at talan samanlagt verður um eitt undirskot á tríggjar til fýra milliónir fyri 2004.

Somikið greiður var fyrrverandi nevndarformaðurin í Faroe Seafood, Hákun Steingrímsson, tá hann saman við øðrum í heyst beyð Framtaksgrunninum 47,5 mió kr. fyri Fiskasøluna. Eitt boð, sum tó varð vrakað.

## Nærri 10

Í tíðindaskrivi, sum hósdagin varð sent føroysku fjølmiðlunum, varð tó upplýst, at talan verður um eitt hall upp á 23,1 mió kr. Av hesum eru óvanligir kostnaðir av umskipanini 7,5 mió kr., og niðurskriving av framleiðslutólunum í Fuglafirði 5,8 mió kr. Hetta seinasta er gjørt, tí ivi er um framhaldandi virksemið í hølunum. Eitt virksemi, sum sambært fyrrverandi leiðsluni vildi hildið fram.

Tað vil við øðrum orðum siga, at hallið av vanliga rakstrinum hjá Fiskasøluni var 9,8 mió kr. Og tað er so als ikki tað, sum fyrrverandi leiðslan vildi vera við.

Hvørki Árni Arge, sum tá var stjóri, ella Hákun Steingrímsson, sum tá var nevndarformaður, vilja í dag gera stórvegis viðmerkingar til tølini, men tað tykist greitt, at teir framvegis standa við tað, sum varð sagt í heyst.

Av teimum 9,8 milliónunum, sum raksturin nú gav í halli, stava 2,5 mió kr. frá niðurskriving av kapitalparti felagsins í Faroe Farming, umframt at niðurskriving av áogn v.m. er framd við 2,8 mió kr. Kapitalpartarnir hevði gamla leiðslan heilt víst verið noydd at niðurskriva, tá hetta verður gjørt út frá roknskapinum fyri Faroe Farming. Hinvegin vil avseting til tap upp á debetorar altíð verða gjørd eftir individuellari meting, og so er spurningurin, hvørt nýggja leiðslan hevur tikið meira til her, enn undanfarna leiðslan vildi. Tað er tó eisini ein spurningur, sum grannskoðarar felagsins taka upp, og tí er ikki víst, at hetta talið vildi verið stórt øðrvísi við eini aðrari leiðslu.

## Turka einki av

Meinhard Jacobsen, stjóri, sigur tó, at teir hava ikki turkað nøkur roknskapartøl upp á nakran, soleiðis at teir hava betri fortreytir at koma við einum góðum úrsliti komandi ár.

– Hvat teir svara fyri, mást tú tosa við teir um. Tølini, sum nú fyriliggja, er grannskoðaði tølini, og tey vísa greitt, hvat úrslitið av rakstrinum var, staðfestir hann.

Spurdur, hvørt tað var neyðugt við so stórum niðurskrivingum, sigur hann, at tað er teirra meting.

– Sum sagt, so er hetta grannskoðði roknskapurin. Her verða so atlit tikin til, hvat ognir felagsins í veruleikanum eru verdar, og so verður niðurskrivingin hareftir, staðfestir Meinhard Jacobsen.

# 15,7 milliónir skeiva vegin

**Sum væntað gjørdist talan um stórt hall hjá Føroya Fiskavirking, tá felagið hevði aðalfund hósdagin**

ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*

13 milliónir eftir reyv. Tað var úrslitið, tá Føroya Fiskavirking legði roknskapin fyri 2004 fyri aðalfundin til góðkenningar.

Í tíðindaskrivi, sum varð sent fjølmiðlunum hósdagin, var sagt, at sjálvur grundraksturin gav eitt hall upp á 13 mió kr., og at felagið hartil misti 2,7 mió kr. av surimi-verkætlanini, sum felagið hevur verið partur av í Fuglafirði.

– Tað er sjálvandi ikki nøktandi, tá vanligi raksturin gevur eitt somikið stórt hall. Men umstøðurnar hava so sanniliga ikki verið við okkum, staðfestir Meinhard Jacobsen, stjóri.

Hann vísur á, at dollarkursurin í fjør hevur verið lágur, og at hetta saman við smáttfallandi upsanum hevur verið ein tungtvigandi orsøk til vánaliga úrslitið.

– Undir vanligum umstøðum er kostnaðurin hjá okkum ríkiliga stórur, og tá hetta so kemur afturat, so verður tað tungt, staðfestir hann.

## 7,55 fyri smáan upsa

Í Noreg verður annars í hesum døgum tosað nógv um júst upsan. Í grein í Fiskaren mikudagin verður staðfest, at smáur upsi hevur givið ein prís upp á 7,55 NKR í seinastuni, men sambært Meinhard Jacobsen, so eru hetta ikki tøl, sum føroyska fiskivinnan kann nýta til nakað sum helst.

– Hyggur tú at Noreg, so talið av virkjum har yviri minkað úr 150 niður í eini 15, so eg haldi ikki, at vit skulu royna at kopiera teirra mynstur.

– Trupulleikin er, at vit fáa ikki virkað tann smáa upsan nóg væl. Vit bæði vóna og vænta, at vit í ár fáa gagnnýtt fiskin betri, men tá talan er um portiónir, so hevur marknaðurin eina hampuliga greiða støðu. Tey vilja hava portiónir, sum eru millum 120 og 160 gram, og tær eru truplar at skera nóg snøgt, tá talan er um smáan fisk. Okkara vón er so, at vit klára at breiðka marknaðin, soleiðis at vit kunnu hava eitt betri úrslit við hesum fiskinum, staðfestir hann.

Lesið Sosialin -so eru tit við!




**Amaltal Fishing Company Ltd, based in New Zealand, want you to work in their modern factory freezer vessels. They offer:**

- 6 paid weeks off to discover New Zealand for every 12 weeks that you work
- **Free Airfares.** Some conditions apply
- Competitive pay rates
- Modern factory vessels offering excellent working conditions
- Join New Zealand's leading and most progressive fishing company
- A variety of positions available. Fishing vessel or factory experience essential.

**To apply contact Graham Thomson today:**
**Phone:** 0044-1343-812764
**Fax:** 0044-1343-815357
**Mobile:** 0044-7774-787414
**Email:** graham@thomsons.uk.com
**Web:** www.amaltal.co.nz

Amaltal